

# Breiði vegurin verður bíligari

**Dótturfelagið hjá Føroya Tele lækkar nú prísirnar fyri breiðband, og harafturat verður ferðin sett upp. Familjan Føroyar fær ágóðan, heldur Richard Mortensen, stjóri í FT Samskifti**

INTERNET
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað verður bíligari og skjótari at brúka breiðband frá Føroya Tele. Í gjár kunngjørdi dótturfelagið hjá Føroya Tele, FT Samskifti, nýggjar prísir fyri breiðband-internet, og felagið bæði lækkar prísirnar lægri og setir ferðina upp.

Prísirnir verða settir niður við 20 prosentum, men samstundis verður ferðin á internetinum tvífaldað.

Umframt príslækkingina og skjótari ferð, fær minsta breiðbandshaldið nú 250 Mbyte ókeypis at taka niður, og miðlinga og størsta haldið verða ókeypis um náttina.

– Breiðbandstænasturnar eru nú á slíkum støði, at øll kunnu vera við. Bíligir prísir og dupult so skjótt samband er nú ein veruleiki. Væntandi koma mundandi fleiri kundar nú at taka av góðu tilboðunum, sigur Richard Mortensen, stjóri á FT Samskifti.

Hann heldur, at við broytingunum eru stórir fyrimunir, serliga fyri familjuna Føroyar, sum kemur at merkja eitt betri og bíligari breiðband.

## Nýtt felag

Tað var í juni mánaði í ár, at P/F FT Samskifti, sum er dótturfelag hjá Føroya Tele, varð stovnað. Hetta varð gjørt fyri at tryggja felagnum somu treytir og møguleikar sum aðrir veitarar á marknaðinum.

Richard Mortensen er stjóri í felagnum, og umleið 100 fólk starvast hjá felagnum.

Føroya Tele hevur annars í eitt ár ført breiðbandið hjá sær fram, og kundatalið er støðugt vaksið hetta árið. Nu ætlar FT Samskifti at fáa enn fleiri at rógva út á internetið.

Tey flestu kunnu eisini taka av, tí breiðbandið er nú útbreitt til 93 prosent av teimum bygdu økjunum í landinum.

*– Breiðbandstænasturnar eru nú á slíkum støði, at øll kunnu vera við, sigur Richard Mortensen, stjóri á FT Samskifti*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nú er tollfrælsi við Ísland

**Fyrstu fruktirnar av Hoyvíks-avtaluni millum Føroyar og Ísland eru longu at síggja. Nú er frítt tollfrælsi millum londini**

SAMSTARV
*Snorri Brend*



*Teir báðir – Davíð Oddsson og Jóannes Eidesgaard – hava undirskrivað enn eina avtalu. Hesa ferð um tollfrælsi millum londini*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Føroyar-Ísland:** Longu í gjár kom fyrsta frælsið eftir sáttmálanum millum Ísland og Føroyar í gildi.

Løgmaður og íslendski uttanríkisráðharrin skrivaðu fyrrapartin í gjár undir eina avtalu um fult tollfrælsi fyri vørur landanna millum.

Hetta merkir, at tollfrælsi nú er fyri allar vørur báðar vegir. Hetta fer so aftur at geva føroyingum stórar fyrimunir í mun til støðuna í dag.

Avtalan um tollfrælsi varð undirskrivað eftir teirri nýggju uttanríkispolitisku heimildarlógini.

– Hetta er at meta sum ein søgulig avtala, tí hetta er fyrstu ferð at »government of the Faroes« er nevnt í einum sáttmála, segði Jóannes Eidesgaard eftir undirskrivingina.

Davíð Oddson fegnaðist eisini um avtaluna. – Ein avtala er bert orð, men nú verða hesi orðini so umsett til gerð, segði hann.

Avtalan um tollfrælsi, sum varð gjørd ígjár, verður bert galdandi í eina tíð. Hon fer nevniliga úr gildi, tá handilssáttmálin – Hoyvíks-avtalan – um øll tey fýra frælsini kemur í gildi, eftir samtykt í Løgtinginum.

Eftir undirskrivingina fór íslendski uttanríkisráðharrin, Davíð Oddsson aftur til heimland sítt.

# Keypa grønmeti úr bygdini

**Sørvágur:** Í dag verður skipað fyri forvitnisligum torgdegi í Sørvági, har til ber at keypa bæði grønmeti og fisk úr bygdini, um ein kann siga tað so.

Torgið verður mitt í bygdini, og byrjar kl. 10 við ókeypis morgunmatarborði, sum Føroya Banki hevur stuðlað.

Oyran í Sørvági er kend fyri at vera sera fruktagóð, og nógv ymiskt slag av grønmeti fæst at vaksa har. Á torginum ber til at keypa eplir, gularøtur, leyk, hvítleyk, kál o.a., sum veltararnir úr Oyruni hava latið.

Fiskurin frá Vesturvón er dygdarvøra. Manningin henda síðsta túrin hevur skorið flak, kjálkar, lippur, bankað turran fisk og hongt fisk upp at ræsa. septembur.

Eisini verður undirhald fyri tey smærru. Mini-tivoli við m.a. hoppiborg verður á økinum og harafturat bomm-tombola.

Við tað at tað er ókeypis at koyra gjøgnum undirsjóar-tunnilin í dag, vænta fyrireikararnir nógvar gestir vestureftir.

**sb.**